# Poeturin



Hóast hon er komin til pensjónsaldur, er hon framvegis líka eiggilig, mjá og mjúk, sum tá arkitekturin Finn Juhl legði sína seinastu kínandi hond á Poeten sofuna í 1941. Tað sigst at við rundleitta, mjáa skapinum, ynskti arkitekturin at tekna tátíðarinnar frælsu list inn í danskar møblar, sum annars vóru eyðkendir av beinum og køldum linjum.

Ein minni romantisk útgáva av søguni vil vera við, at Poeten var ein praktisk neyðloysn, tá Finn Juhl skuldi innrætta sína stovu, sum var so evaska lítil, at vanligar sofur ikki rúmaðust í henni.

Onnur halda uppá, at arkitekturin fekk íblástur til sofuna frá kendu teknirøðini ”Poeten”, sum enn er at finna í danska vikublaðnum Hjemmet. Staðfestast kann í øllum førum, at tá teknirøðin varð filmatiserað í 1959, sótu og lógu leikararnir í design-møblum hjá Finn Juhl – millum annað í Poeten sofuni.

Ein ektað Poeten hevur framvegis hondseymað betrekk og bein úr teak. Vilt tú hava eina slíka í stovuni, skalt tú av við einar 45.000 krónur.



# Gulleggið




Heimskendi stólurin Eggið heldur 50 ára føðingardag í hesum døgum. Og fyri at staðfesta, at arkitekturin Arne Jacobsen hevði lagt onki minni enn eitt designara gullegg, tá í 1958, eru 999 gylt Egg júst send út í útvaldar handlar.

Fyri fyrstu ferð fæst stólurin nú í sjokulátalittum ruskinni og leðri við stelli úr hondpussaðari bronsu, sum fær ein serliga vakran ellisdám við tíðini.

Øll 999 Eggini eru gjørd í sama liti og tilfari. Á hvørjum einstøkum stóli er eitt unikt nummar graverað undir setrinum saman við einum stuttum teksti, ið sigur søguna um Eggið hjá Arne Jacobsen.

Upprunaliga var Eggið partur av innbúgvinum, sum Jacobsen teknaði til SAS Hotel Royal í Keypmannahavn. Tankin við stólinum var, at við snarimekanismuni, kann tann, ið situr í honum, sjálvur velja, hvønn ella hvat, hann vil vísa sítt uppmerksemi. Ella hann kann velja at venda øllum bakið og hvørva inn í sermerkta designið, sum inn í eitt hylki.

Eitt ekta Gullegg kostar 81.250 krónur.

Upplivingin av at sita í einum Eggi kann tó gerast eitt sindur bíligari, um tú skrivar teg inn á kamar nummar 606 á SAS Royal Hotel. Tað er nevniliga einasta kamarið á hotellinum, sum framvegis er innrættað við upprunaligu Arne Jacobsen møblunum.